-Vit vilja í minsta lagi hava heiðursmerki

Øll fótbóltsáhugað í Føroyum munnu vera á einum máli um, at John Petersen hevur hesi síðstu árini verið millum Føroya bestu og mest áhugaverdu fótbóltsleikarar, bæði her á landi, og tá tað kemur til landsliðsfótbólt. Men nú byrjar eitt nýtt kappingarár, sum hevur nýggjar avbjóðingar, bæði í heimligu kappingini, úti í Europa og á landsliðnum. Vit hava tosað við John Petersen um framtíðina, felagið, landsliðið og fótbóltstilveruna hjá honum sum heild

HEINI Í SKORINI

Góðan dag John
– Góðan dag

Ja, nú byrjar so ein nýggj kapping, hvørji mál hava tit í B36 sett tykkum í ár?
Ja, nú haldi eg ikki at man kann siga, at vit hava sett okkum nakað ávíst mál, men B36 eigur at vera við í stríðnum um FM-heitið, so vit vilja í hvussu so er hava eitt heiðursmerkjapláss, tað vil siga ímillum 3 tey bestu. Tað haldi eg, at man í minsta lagi kann siga.

Tit hava fingið eina ringa byrjan, bæði í vinardystunum og í fyrsta steypadysti í Fuglafirði. Hvør er orsøkin til tað?
– Ja, í vinardystum verður alt møguligt roynt, og man líkasum roynir seg fram og "eksperimenterar" við at gera nógv nýtt á liðnum. Vit hava eisini sum teimum flestu kunnugt mist sera nógvar spælarar, fingið nýggjan venjara, og serliga í verjuni hava vit mist nógvar spælarar frá í fjør, so har er bara nýtt fólk. So í venjingardystunum haldi eg ikki, at úrslitini eru so eftirfarandi. Man brúkar meiri teir dystirnar til at finna útav, hvussu vit skulu spæla, og hvar alt hetta ymiska nýggja fólkið skal brúkast. Men tað, at vit taptu fyrsta steypadystin, er ikki gott, og tað skuldu vit ikki havt gjørt. Ja, eg veit ikki, hvat hendi har, men tað var í hvussu so er ikki gott.

Men hvørjar vónir hevur tú so til árið í ár?
– Ja, nú hava vit skift hampuliga nógv fólk út, so tað er eitt sindur ringt at siga, hvussu tað kemur at koyra hjá okkum í ár, og vit eru jú enn ikki heilt vissir í, hvat fólk kemur at spæla við okkum í ár, og um nakar spælari kemur afturat. Men eg vil siga, at vónirnar mugu vera góðar, sjálvt um tað tekur tíð at spæla eitt nýtt lið saman og fáa tað heila at koyra hjá okkum.

Tit hava mist nógvar lyklaleikarar frá í fjør, so sum Pól Thorsteinsson, Ninoslav Milenkovic, Tomislav Sivic, Øssur Hansen og Arnbjørn Danielsen. Hvussu ætla tit at fylla tey tómrúmini?
– Jú, tað er serliga í verjuni, at vit hava mist spælarar. Vit mistu jú Pól og Arnbjørn, og so er tað eitt sindur ivasamt, hvussu verður við Jens Kristian Hansen, so tað er serliga í verjuni, at tómrúmið fer at vera. Men eg vil siga tað, at har mugu bara ungir menn koma inn, og so fáa vit at síggja, um teir klára at standa royndina. Vit hava eisini mist bæði Tomislav, Ninoslav og Øssur, men eftir mínari meting hava vit havt nokkso nógv offensivt fólk og fingið nakrar nýggjar kreftir inn afturat eisini, so eg rokni ikki við, at tað skuldi farið at bila á tí økinum.

Hvørji lið vera eftir tínari meting tey drúgvastu í ár?
Eg vænti serliga, at KÍ vera drúgvir, tí teir vunnu jú í fjør og hava ikki mist nakað fólk uttan málmannin. Og so rokni eg eisini nógv við GÍ, sum eisini hava nakað tað sama av fólki sum í fjør, og teir gjørdist jú nummar tvey. So teimum báðum liðunum vænti eg heilt nógv av. So er tað sjálvandi HB, sum altíð er við í toppinum, og B68 hevur eisini fingið nógv nýtt fólk, ella um man kann siga gamalt nýtt fólk innaftur, og tað er sera gott fólk, sum teir hava fingið, so teir kunnu gerast sera góðir. So vænti eg sjálvandi, at vit sjálvir eisini fara at blanda okkum uppí í stríðnum um FM-heitið.

Tit hava skift venjara frá í fjør. Er tað øðrvísi at spæla undir nýggja svenska venjaranum Pelle Andersen í mun til Tomislav Sivic í fjør?
Ja, eg veit ikki. Nú hava vit ikki spælt so nógv undir nýggja venjaranum enn, men teir eru heldur ólíkir, serliga í venjingarhátti. Men teir hava tað til felags, at báðir hava gingið inn fyri og dámt væl álopskendan fótbólt, so á tann hátt haldi eg ikki, at tað verður so øgiliga stórur munur á okkara spæli, hóast teir báðir eru ymiskir.

Tit skulu eisini royna tykkum í europeiskum høpi, og í fjør var um reppið, at tit komu víðari. Hava tit sett tykkum nøkur mál viðvíkjandi tí?
Nei, eg haldi ikki, at vit endiliga hava sett okkum nakað ítøkiligt mál, men tað er næstan hvørt ár, at man skal út í Europa at spæla , og so vónar man sjálvandi altíð at koma víðari. Men tað er lættari sagt enn gjørt, og nú fáa vit heldur ikki at vita enn, hvørjum vit møta, so man kann altíð vóna at koma víðari, hóast eg ikki haldi, at man kann vænta sær tað heilt stóra. Men sjálvandi, møtir man einum liði, sum man á pappírinum hevur ein kjans ímóti, so er tað jú púra givið, at man fer eftir honum.

Perónliga hevur tú fleiri uppgávur liggjandi fyri framman við landsliðnum. Ert tú nøgdur við tann bólk tit eru komnir í?
Bæði ja og nei. Nú havi eg verið nøkur ár á landsliðnum, so eg hevði væl kunna hugsað mær at møtt einum av teimum stóru londunum, annaðhvørt Týsklandi, Englandi, Italia ella Hollandi. Tað hevði verið ótrúliga stuttligt. Men tað tykist, sum fáa vit altíð hesi eystur-lendsku liðini, og nú hava vit jú møtt bæði Russlandi og Yugoslavia fyrr, so eg haldi, at tað hevði verið nógv stuttligari, um vit høvdu møtt einum av teimum stóru liðunum, hóast tað eisini eru sterk lið, vit koma at møta hesaferð. Men at møta t.d. Luksemburg og Sveits, tað hava vit ikki gjørt fyrr, so tað er í sær sjálvum eisini hampiliga stuttligt.

Hava tit sett tykkum nakað mál á landsliðnum, hóast tað kanska er eitt sindur tíðliga at tosa um tað?
Jú, man vil jú sjálvandi altíð koma longur upp á FIFA ramglistan, men í fyrsta umfari hugsa vit um at fáa stig, at koma longur upp í okkara bólki, og sum heild at fáa so nógv góð úrslit sum gjørligt, hóast tað enn er eitt sindur tíðliga at tosa um at koma víðari. Men sum heild at fáa stig, antin við at vinna ella at spæla javnleik, tað er í stuttum tað sum vit ynskja.

Nú fyllir tú 28 ár í ár, og tað hevur fleiri ferðir verið uppá tal hjá tær at royna teg uttanfyri landoddarnar. Hevur tú nakrar vónir ella ætlanir viðvíkjandi tí?
Ja, nú gangi eg í skúla, og tað verður í hvussu so er til í summar, tí tá eri eg útlærdur á læraraskúlanum. So áðrenn eg verið útlærdur, hendir so einki. Eg havi nakrar ferðir verið uttanlanda, meðan eg havi gingið á læraraskúla, og hvørja ferð eg eri farin, havi eg verið noyddur at steðgað við skúlanum og sett hann til síðis. Men nú havi eg so avgjørt at gera skúlan lidnan og ikki gera nakað, fyrr enn eg eri liðugur við tað. Um eg fái ein góðan møguleika tá, so eri eg heitur fyri tí. Men um tað longu verður í summar, ella um tað verður, tá heimliga landskappingin er liðug, tað veit eg ikki heilt. Tað fáa vit at síggja. Men eg hevði væl kunna hugsað mær at sloppið út at royna meg uttanlanda, um tað var okkurt ordiligt sum stakk seg upp, men eg fari ikki uttanlands bara fyri at fara.

John, vit siga takk fyri prátið og ynskja tær góða eydnu í framtíðini
Jú, sjálvur takk.

Spennandi kvartfinalur

Í kvøld og í annaðkvøld bresta 8 tey síðstu liðini saman í kvartfinalunum í Champions League. Lagt er upp til fýra sera spennandi, dramatiskar og tættar dystir

HEINI Í SKORINI

Kvartfinalurnar í Champions league vera sera spennandi, har dystirnir fara at vera ímillum Manchester United-Real Madrid, Porto-Bayern Munchen, Chelsea-Barcelona, og Valencia-Lazio. Tveir teir fyrstnevndu dystirnir vera týskvøldið, og hinir báðir vera so mikukvøldið.

Tvær av kvartfinalunum vera eitt slag ímillum Ongland og Spania, har Manchester United og Chelsea skulu royna at syfta ávikavist Real Madrid og Barcelona, sum eru nógv tey mest dominerandi liðini í Spania. Manchester United vunnu Champions League í fjør, meðan Real Madrid vann í fyrra árið, so hetta verður ein dystur millum báðar teir síðstu Champions Leagu vinnararnar. Real Madrid hava nakrar skaddar spælarar í løtuni sum ikki vera við, og ein teirra er landsliðáleyparin Fernando Morientes, og tað er ein dyggur smeitur fyri Real Madrid. Men hetta gevur samstundis franska "problembarninum" Nicolas Anelka møguleikan í álopinum saman við toppskjúttnaum hjá Real Madrid, Gonzales Blanco Raul. Manchester hevur sum so teir flestu leikararnar tøkar, og hóast einki lið kann sigast at vera favorittur, so hevur United spælt nógv betri seinastu tíðina.

Teir endaðu á fremsta plássi í undanfarna bólkaspæli, meðan tað var í síðstu løtu at Real Madrid kom víðari uppá innanhýsis dystir móti Dynamo Kiev. Men hóast tað, verður lagt upp til ein stórdyst í kvøld á heimavøllinum hjá Real Madrid, Santiago Bernebau.

Chelsea skal steðgað Rivaldo og co

Hitt slagið millum eitt spansk og eitt enskt lið, er dysturin millum Barcelona og Chelsea, sum verður leiktur mikukvøldið. Barcelona er flúgvandi í løtuni, og teir endaðu klárt á odda í undanfarna bólkaspæli. Chelsea hava haraftur ímóti ikki spælt líka gott seinastu tíðina, og teir endaðu á øðrum plássi, eitt stig aftan fyri Lazio, í undanfarna bólkaspæli. Trupulleikin hjá Chelsea í ár hevur kanska serliga verið í álopspartinum, har teir ikki hava havt nakran veruligan málslúkara, hóast norðmaðurin Tore Andre Flo hevur skorað nøkur mál. Sum eina royndfyri ar loysa trupulleikan, hava teir leigað liberianska áleyparan George Weah frá Milan fyrr í ár, men hann hevur ikki loyvi at spæla við í Champions League, so álopið hjá Chelsea móti Barcelona verður nokk Tore Andre Flo, saman við lítla italiumanninum Gianfranco Zola, og so vóna teir í Chelsea, at Úruguayanarin Gustavo Poyet kann geva álopinum eitt sindur av íblástri frá miðjuni.

Annars kann sigast, at hóast hetta verður ein javnur og tættur dystur, so verður tað trupult hjá Chelsea at steðgað Kluivert, Figo, Rivaldo og hinum stórspælarunum úr Barcelona. Serliga skal Chelsea halda eyguni við síðst nevnda Rivaldo, sum jú fyrr í ár var valdur til bæði heimsins og europa besta leikara. Liggur bólturin til vinstra bein, og fær hann bara eitt sindur av plássi, vísir tað seg ferð eftir ferð, at hann hann ger tað avgerandi málið ella avgerandi avleveringina.

Jardel vónin hjá Porto

Hinar kvartfinalurnar fara at standa ímillum Bayern München-Porto, sum verður í kvøld, og Lazio-Valencia í annaðkvøld. Bayern er stórfavorittur til dystin móti Porto, og teir eru kanska tað liðið, sum have verið mest sannførandi higartil í Champions League. M.a. vunnu teir ikki minni enn 4-2 og 4-1 á áðurnevndu Real Madrid. Týsku risarnir hava stórt sæð allar spælarar tøkar, og tað verður ein sera stórur biti hjá portugisisku meistarunum at gloypa. Porto var ikki eitt lið, sum ein hevði roknað við fór at koma so langt í hesi kapping, men Porto hevur eitt sera vandamikið vápn, og tað er brasilski áleypari teirra Mario Jardel, sum eisini er toppskjútti í Champions League í ár. Hann hevur vístseg ferð eftir ferð at vera tann avgerandi leikarin í einum Porto sigri, og alt kann henda, um hann hevur ein góðan dag.

Síðani skal triðja spanska liðið av teimum átta í eru eftir, spæla ímóti stjørnuspælarunum úr Rom, Lazio. Valencia hevur vístseg, eins og Porto, at klárað seg betri, enn væntað var framman-undan, og teir hava eisini vístat teir megna at spæla móti teimum heilt stóru liðunum.

Eitt nú spældu teir javnleik móti áðurnevndu Manchester United í síðsta dysti í undanfarna bólkaspæli, hóast United longu var komi víðari. Styrkin hjá Valencia er heilt vístí álopspartinum, har Claudio Lopez og Adrian Ilie kunnu seta eina og hvørja verju uppá pláss. Høgri vongur teirra, Gaizka Mendieta, sum eisini spældi við spanska landsliðnum herfyri, er eisini ein sera týðandi leikari hjá Valencia. Lazio komu við sigrinum á Chelsea upp á fyrsta pláss í undanfarna bólki, men hóast teir endaðu á odda í bólkinum, hava teir vístsínar veikleikar. Eitt nú taptu teir 2-1 á heimavølli móti Feyenoord, sum jú ikki er eitt av teimum sterkaru liðunum í Champions League. Men hóast tað hava teir sera gott fólk, so sum Juan Veron, Marcelo Salas, og ikki at gloyma Sinisa Mihajlovic, sum má vera besti frísparksskjútti í øllum heiminum. Og tað, at teir jústhava vunnið italienska toppdystin á Juventus, gevur teimum meiri sjálvsálit til dystin ímóti Valencia. Ein kann illa siga, hvør fer at koma víðari, men á pappírinum er ikki frítt, at Lazio er sterkara liði.

Alt í alt fýra spennandi og vónandi eisini undirhaldandi kvartfinalur, í kvøld, týskvøldið og mikukvøldið.

Kasparov til Føroyar

Tað tykist nú greitt, at um ymisk viðurskifti fáast í rættlag, at Gary Kasparov kemur á vitjan í Føroyum. Antin í summar ella á sumri 2001

JÁKUP MØRK OG CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Eitt gylt lógvtak. Heimsins besti telvari nakrantíð, Gary Kasparov, og Rani Nolsøe. Nú er bert spurningur um tíð, áðrenn vit síggja Kasparov í Føroyum. Mynd: Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Talvsamband Føroya fór í farnu viku til Íslands við tí fyri eyga at fáa heimsins besta telvara nakrantíð at koma á vitjan í Føroyum.

Kasparov vann

Íslendska talvsambandið skipaði um vikuskiftið fyri kvikkapping í Reykjavík, har nakrir av heimsins sterkastu telvarunum vóru millum luttakararnar.

Gary Kasparov, Annand og Victor Kortsnoi og aðrir góðir menn vóru millum luttakararnar.

Stóru leikararnir megnaðu eisini at prógva, hví teir vóru styrkismettir sum fremstu telvararnir í kappingini, og finaludysturin kom at standa millum Kasparov og Annand. Teir báðir hava ofta leikt avgerandi dystir sínamillum fyrr, og hesu ferð varð tað Kasparov, sum at enda vann talvið og kappingina.

Áhugaðir fyri føroyavitjan

Í sambandi við at Kasparov soleiðis bert var fáar hundrað kilometrar frá Føroyum, gjørdi føroyska talvsambandið av, at fara til Íslands at hitta heimsmeistaran og lið hansara, fyri at kannað, um møguleiki var fyri at fáa hann hendavegin.

Ferðin gekst somikið væl, at formaðurin í talvsambandinum, Rani Nolsøe, fekk orð á bæði Kasparov og umboðsmann hansara, og vóru hesir áhugaðir í at koma til Føroya. Owen Williams, sum er umboðsmaðurin hjá heimsmeistaranum, var sera fryntligur, og hann var beinan vegin áhugaður í at koma hendan vegin. Júst nær hetta verður, er ilt at siga, men frá Rana Nolsøe frætta vit, at talan helst verður um eina summarvitjan, sum antin verður komandi summar, ella miðskeiðis í ár 2001.

Tað er sjálvandi ikki bíligt at fáa slíkan leikara at koma á vitjan. Vit hava ikki fingið upplýst nakra upphædd, men sum skilst er talan um eina stóra samsýning.

Enn er alt ikki endaliga avgjørt, men hol er so sett á samráðingarnar, og í næstum verður væntandi farið undir at tosað við stuðlar, sum eru ein avgjørt neyðug fortreyt fyri at kunna skipa fyri vitjanini.

Ætlanin er, at Kasparov skal vitja í Føroyum í einar tveir dagar, har hann t.d. kann leika simultan móti landsliði okkara, hava fyrilestrar um talvlív hansara, umframt at hava venjingar við áhugaðum føroyskum leikarum.

Endamálið við hesum er at økja um áhugan fyri talvi í Føroyum, umframt at tað uttan iva verður sera læruríkt hjá fremstu telvarum okkara at hitta ein somikið góðan leikara.

Owen Williams, umboðsmaður hjá Kasparov, var sera blíður og vísti stóran áhuga fyri Føroyum, tá hann hitti Rana Nolsøe, formann í Talvsambandinum. Mynd: Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Máltindurin

1. deild kvinnur

Ioana Rápa	VÍF	163	(47)
Regina Rádó	VB	154	(46)
Lotte Sørensen	Kyndil	150	(60)
Vesna Tomajek	Stjørnan	135	(54)
Sunrid Gleðisheygg	Tjaldur	104	(26)
Jacklin Durhuus	VÍF	100	(7)
Inga F. Danberg	Neistin	96	(21)
Simona Hansen	Stjørnan	92	(8)
Arnleyð Krosslá	VB	91	0
Katrin á Neystabø	Neistin	90	(25)
Gurið Mortensen	VB	88	(3)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	84	(2)
Annika Ljósstein	Stjørnan	82	(17)
Jórun Ludvig	Kyndil	79	(1)
Ann Hansen	Kyndil	74	(12)



Toppskjúttarnir í teimum báðum fremstu hondbóltsrøðunum, Ioana Rapa og Áki Olsen

1. deild menn

Heini Joensen	Neistin	189	(36)
Áki Olsen	Neistin	188	(27)
Sámal Joensen	VÍF	174	(34)
Artur Johansen	StÍF	159	(36)
John Petersen	StÍF	149	(46)
Jacob Jónsson	Kyndil	135	(18)
Ingi Olsen	VÍF	134	(16)
Sverri Justinussen	Tjaldur	125	(28)
Bjarni Wardum	Kyndil	118	(25)
Petur Martin Johansen	KÍF	117	(40)
Halgir D. Olesen	H71	113	(7)
Hans Á. D. Christiansen	Kyndil	100	(16)
Vagnur Johannesen	KÍF	96	0
Petur Martin Poulsen	KÍF	95	(10)
Eyðun Højgaard	H71	87	(16)

Støðan 1. deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	vunnin t	mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	10	9	-	0	-	1	583	449	134	27
2 Neistin	10	8	-	0	-	2	436	405	31	21
3 Kyndil	10	5	-	1	-	4	474	421	53	18
4 VÍF	10	4	-	1	-	5	475	457	18	16
5 VB	10	3	-	0	-	7	511	520	-9	10
6 Tjaldur	10	0	-	0	-	10	353	580	-227	0

Stíf hevur tikið liðið úr kappingini

Støðan 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	vunnin t	mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Neistin	12	12	-	0	-	0	714	589	125	33
2 VÍF	12	9	-	0	-	3	690	545	145	29
3 StÍF	12	8	-	0	-	4	689	596	93	27
4 Kyndil	12	7	-	0	-	5	680	578	102	21
5 H71	12	3	-	0	-	9	557	671	-114	8
6 KÍF	12	3	-	0	-	9	534	687	-153	7
7 Tjaldur	12	0	-	0	-	12	557	755	-198	3